## 1. Dátuverndarkunning frá Fonn Flog

Vælkomin til dátuverndarkunning frá Fonn Flog. Sum dátuábyrgdari er tað skyldan hjá Fonn Flog at tryggja, at viðgerðin av tínum persónupplýsingum eru í samsvar við ásetingarnar í dátuverndarlógini og at tann skrásetti (tað er tú) er kunnað/ur um, hvat ið er skrásett um teg.

Vit taka dátuvernd í álvara, og hava tí samtykt hendan privatlívspolitikk, sum sigur tær, hvussu vit handfara tínar persónupplýsingar á Fonn Flog.

## 2. Vit eru dátuábyrgdari – Hvussu kanst tú seta teg í samband við okkum?

Fonn Flog er dátuábyrgdari fyri viðgerðina av teimum persónupplýsingum, ið vit hava móttikið um teg. Um tú ynskir at venda tær til okkum viðvíkjandi okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum, kanst tú venda tær til:

Fonn Flog Sp/F
Biskupsstøðgøta 10
Box 109
FO-700 Klaksvík

+298 47 63 63
Fonn Flog@Fonn Flog.fo

## 3. Nær viðger Fonn Flog persónupplýsingar um teg

Fonn Flog viðger persónupplýsingar um teg í samband við ráðgeving og sølu av ymsum sløgum av ferðum/ferðaseðlum.

Tað kann verða at Fonn Flog hevur gjørt eina avtalu við teg, og tí er neyðugt hjá okkum at fáa persónupplýsingar um teg.

Fonn Flog hevur bæði eina Facebook síðu og eina Instagram síðu. Her viðger Fonn Flog persónupplýsingar um teg, um tú dámar, viðmerkir ella deilir eitt av uppsløgunum hjá Fonn Flog. Afturat hesum viðgera Facebook og Instagram eisini upplýsingar um teg um tú sendir teimum beinleiðis boð ígjøgnum hesar miðlarnar.

Eisini kann tað verða at tú hevur sent Fonn Flog, ein fyrispurning, ein ordra, eina klagu, ella eina starvsumsókn, o.l. sum ger at Fonn Flog skal viðgera tað tú sendir inn, hetta ger at tínar persónupplýsingar verða viðgjørdar.

# 4. Endamálini við og heimildin fyri viðgerðini av tínum persónupplýsingum

Fonn Flog er ein ferðaskrivstova, sum selir ferðir kring allan knøttin. Vit eru 15 starvsfólk, sum fegin vilja geva kundum okkara ta bestu tænastuna, vit kunnu veita. Vit hava frá byrjan av lagt áherðslu á, at Fonn Flog skal vera ein ferðaskrivstova, sum setir kundan í hásæti.

Fonn Flog selir alt slag av ferðum/ferðaseðlum. Skalt tú bert hava ein ferðaseðil, ella skal tað vera við hotelli, bili, frítíðaríbúð ella hvat tað skal vera, kunnu vit hjálpa tær. Vit hava samband við nógvar ferðaskrivstovur uttanlands, sum hjálpa okkum við ferðum víðari út í heim og hava eisini samband við nógvar av teimum donsku charter-ferðaskrivstovunum, sum selja bíligar ferðir. Skalt tú hava hotel ella bil, hava vit avtalur við nógv hotel og bilútleigarar, soleiðis at vit kunnu geva tær ein bíligari prís, enn um tú bíleggur tað frá gøtuni.

Fá eitt prát við okkum, og vit hjálpa tær at finna dreymaferðina. Vit snikka ferðina saman júst eftir tínum tørvi og tínum ynskjum.  Vit gera okkara besta fyri at veita kundum okkara eina góða tænastu, og at veita tykkum eina trygga og góða ferð!

## 4.1 Heimilaði endamál við viðgerðini

Heimildargrundarlagið fyri viðgerðina av tínum persónupplýsingum er fyri tað mesta grundað á at vit hava gjørt eina avtalu við teg sbrt. §8, stk. 1, nr. 2 í dátuverndarlógini.

Heimildirnar  eru annars  (úr dátuverndarlógini):

- Samtykki. §8, stk. 1, nr. 1
- Avtala. §8, stk. 1, nr. 2
- Rættarlig skylda. §8, stk. 1, nr. 3 og sum nevnt omanfyri
- Heimilað áhugamál. §8, stk. 1, nr. 6
- Nágreiniligt samtykki, sbrt. §12, stk. 1, nr. 1

# 5. Sløg av persónupplýsingum

Vit viðgera hesi sløgini av persónupplýsingum um teg:

- Vanligar persónupplýsingar. Talan er fyri tað mesta um vanligar persónupplýsingar, so sum fornavn, eftirnavn, bústað, býur/bygd, postnummar og samskiftisupplýsingar sum telefonnummar og teldupostadressa.

- Viðkvæmar persónupplýsingar.  Tað kann verða at tú sendur okkum viðkvæmar persónupplýsingar t.d. pass og heilsuupplýsingar, sum eru viðkomandi til ferðingina.
- Gjaldsupplýsingar. Gjaldið fyri arbeiði gjørt av okkum, sambært avtalu við tykkum.
- Um tú ert virkin á Facebook/Instagram síðuni eru tað hesar upplýsingar, ið verða viðgjørdar: For- og eftirnavn, mynd, aðrar upplýsingar tú sjálv/ur hevur deilt og/ella dáma við tínum vanga.

## 6. Móttakarar ella bólkar av móttakarum

Fonn Flog gevur í útgangsstøðinum ikki persónupplýsingar víðari. Men vit nýta í summum førum dátuviðgerarar, sum hjálpa okkum við at viðgera tínar upplýsingar á góðan og tryggan hátt. Tað kann m.a. vera aðrar ferðaskrivstovur, hotellir, bilútleiga osv, umframt  bókhald og goymsla/viðgerð av persónupplýsingum, ella um vit fáa hjálp frá uttanhýsis ráðgevum.

Tað kann eisini verða at vit geva fartelefonnummari hjá tær til veitarar av ferðum, soleiðis at tey kunnu fáa fatur í tykkum tá tit eru á ferð.  Ofta senda tey upplýsingar við sms.

## 7. Flutningur til móttakarar í útlondum, triðjalondum ella í millumtjóðafelagsskapum

Sum meginregla flytur Fonn Flog ikki persónupplýsingar til triðjaland.  Vit nýta tó KT-veitarar, sum gerð at persónsupplýsingar verða viðgjørdar í triðjalandi, herundir eisini USA.  Hetta er galdandi fyri í t.d. Office 365 og til sosialu miðlarnar har móttakarin er í USA.

Um so er at vit flyta tínar upplýsingar út um ES/EBS, fara vit at tryggja okkum nøktandi heimildargrundarlag fyri flutninginum – hetta merkir, at vit tryggja okkum, at verndarstøðið av tínum upplýsingum er nøktandi.

Um tú brúkar okkara síðu á Facebook og Instagram, so verða tínar persónupplýsingar brúktar av teimum. Her kanst tú lesa meira um privatlívspolitikkin hjá Facebook/Instagram.

## 8. Hvaðani persónupplýsingarnar stava

Persónupplýsingar, sum vit viðgera, eru oftast í sambandi við at tú hevur biði um eina tænastu, eru innheintaðar beinleiðis frá tær.

Tú hevur altíð rætt til at vita, hvaðani vit heinta upplýsingar um teg.

## 9. Tíðarskeiðið, sum persónupplýsingarnar verða goymdar

Fonn Flog hevur skyldu at ansa eftir, at persónupplýsingar verða goymdar soleiðis, at tað ikki er gjørligt at eyðmerkja skrásetta longur enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini. Vit goyma tínar persónupplýsingar so leingi, tað er neyðugt í sambandi við tað viðgerð, vit hava, ella um skrásetti persónurin ynskir persónupplýsingarnar strikaðar.

- Vanligar persónupplýsingar í samband við tænastuveitan. Hesar upplýsingar verða goymdar í umleið 5 ár, ella so leingi tað er neyðugt hjá Fonn Flog at hava tær.
- Viðkvæmar persónupplýsingar, sum verða givnar Fonn Flog í sambandi við starvsumsóknir, verða burturbeindar eftir 1 ár, um umsóknin ikki førdi til starvssetan.
- Sosialu miðlarnir. Á hvørjum ári verða sosialu miðlanir hjá Fonn Flog gjøgnumgingnir, og myndir verða strikaðar, tó uttan tær myndir, sum eru av sera generellum karakteri – tær kunnu verða verandi á sosialu miðlunum. Tó so, um onkur ynskir at myndir skulu strikast, so verða tær strikaðar – beinanvegin, uttan drál.
- Roknskaparupplýsingar, sum er í pappír formi, verða burturbeindar eftir 5 árum.

## 10. Automatiskar avgerðir verða ikki tiknar, undir hesum profilering

Vit nýta ikki automatiskar avgerðir, og tað er eingin háttur av profilering gjørd.

## 11. Rættin til at taka samtykki aftur

Um tú hevur givið okkum samtykki, kanst tú altíð taka tað aftur. Hetta kanst tú gera, við at seta teg í samband við okkum (sí samskiftisupplýsingar í 2. broti).

Um tú velir at taka títt samtykki aftur, ávirkar tað ikki løggildið av okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum fram til afturtøkuna. Um tú tekur títt samtykki aftur, hevur tað bert virknað fyri framtíðina.

## 12. Tíni rættindi

Sambært dátuverndarlógini hevur tú rættindi í samband við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum.

Um tú ynskir at nýta tíni rættindi, skalt tú seta teg í samband við okkum (sí samskiftisupplýsingar í 2. broti).

### 1.1. Rætturin til innlit (§ 26)

Tú hevur rætt til at fáa innlit í tær upplýsingar, sum vit viðgera um teg.

### 1.2. Rætturin til rætting (§ 27)

Tú hevur rætt til at fáa rangar upplýsingar um teg sjálvan rættaðar.

### 1.3. Rætturin til striking (§ 28)

Í summum førum hevur tú rætt til, at fáa upplýsingar um teg sjálvan strikaðar, áðrenn okkara ætlaðu striking.

### 1.4. Rætturin til viðgerðaravmarking (§ 29)

Í summum førum hevur tú rætt til at fáa viðgerðina av tínum persónupplýsingum avmarkaða. Um tú hevur rætt til at fáa viðgerðina avmarkaða, kunnu vit framyvir í útgangsstøðinum bert goyma persónupplýsingarnar.

### 1.5. Rætturin til dátuflutning (§ 31)

Tú hevur í summum førum rætt til at fáa tínar persónupplýsingar útflýggjaðar í einum skipaðum, vanliga nýttum og teldutøkum sniði, og at fáa hesar persónupplýsingar fluttar frá einum dátuábyrgdara til ein annan uttan forðing.

### 1.6. Rætturin til mótmæli (§ 32)

Tú hevur í summum førum rætt til at mótmæla okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum.

Tú kanst eisini mótmæla okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum til beinleiðis marknaðarføring.

## 13. Kæra til Dátueftirlitið

Tú hevur rætt til at kæra til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgdur við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum. Tú finnur samskiftisupplýsingarnar hjá Dátueftirlitinum á heimasíðuni www.dat.fo.

----------------------------------------------------

Seinast dagført 6-05-2025